**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 2 |
| Tíð: | 10-03-2022 klokkan 13 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.
Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, kundi ikki møta.

**Fundarskrá:**

1. Fyrireiking til Ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 15. mars
2. Leikluturin hjá Eldraráðnum til ráðstevnuna
3. Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
4. Ymiskt

AD 1 Fyrireiking til Ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 15. mars

Skráin fyri ráðstevnuna var lisin og semja var um, at skráin var góð og viðkomandi.
Serliga var tosað um bústaðarneyðina í TK við serligum atliti til búðstaðir til eldri borgarar.

Julianna nevndi, at í londum rundan um okkum hava eldri borgarar notið gott av ”almennyttige boliger”, bygdar til eldri fólk. Fýlst var á, at TK ikki nýtir tær lógarheimildir kommunan hevur til bygging av bústaðum til eldri borgarar, tað verður seg eigara-, leigu- og lutaíbúðir.

Undarligt at kommunur sum Runavík og Skálavík – har ongin bústaðarneyð er – kunnu stuðla uppundir stórar verkætlanir, meðan TK ongar ítøkiligar ætlanir hevur um búðstaðir til eldri borgaran – hóast bústaðartørvurin í høvuðstaðnum er størri enn íbúgvaratalið í báðum omanfyrinevndu kommunum tilsamans.

AD 2 Leikluturin hjá Eldraráðnum til ráðstevnuna

Tosað var um hvørji mál Eldraráðið serliga skuldi taka fram á rástevuni 15. mars og hevur bústaðarneyðin hægstu raðfesting.

AD 3 Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi

Fundarfrágreiðin 2022-1 var lisin og góðkend.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**



AD 4 Ymiskt

Eldraráðið harmast, at leiðarin fyri Býarsavnið hevur sagt seg úr starvi. Tað átti at borið til at fingið savninum innivist á hóskandi stað. Her vóru nevnd húsini hjá Andreas í Vágsbotni, sum eru lýst til sølu. Staðsetingin er mitt í býnum og kundi hýst savninum umframt at verið eitt slag av undirhúsið, har eldri borgarar kunnu savnast.

Komandi fundur verður longu komandi hósdag, 17. mars klokkan 13. Fundurin fer fyrst og fremst at snúgva seg um eftirmeting av ráðstevnuni og at finna viðkomandi evni fram til fundin við borgarstjóran mikudagin 30. mars. Skráin skal sendast TK i góðari tíð áðrenn tann fundin.

Skriva tann 12. Mars 2022.

Petur Rouch,
skrivari